From: Gudrun Mortansdóttir Nolsøe <gudrunnolsoe@lmr.fo>
Sent: fríggjadagur, 5. apríl 2024 14:04
To: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Cc: Bjarni Kárason Petersen <bjarni@lmr.fo>
Subject: Skriv til Fíggjarnevndin um nevndir og øki, sum er flutt Kærustovnin og hugleiðing um hvat kann flytast í framtíðini - LM-076/2023
Importance: High

Til Fíggjarnevndina
Í samband við fundarinnkallingina um avtøku av kærunevnd trygdargrunsin (Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.) LM-076/2023 varð spurt, hvørji øki vóru flutt til Kærustovnin, og hvørji øki framyvir kundu flytast. Spurt var eisini um, hvat er eftir at flyta til Kærustovnin.

Álit um Føroya Kærustovn var handað løgmanni í november 2020. Í álitinum varð mælt til at avtaka kærunevndirnar og flyta avgerðarheimildirnar til Føroya Kærustovn. Løgtingslóg um Føroya Kærustovn kom í gildi 25. november 2021, og í 2022 var farið undir at umskipa Kærustovnin, soleiðis at Kærustovnurin gjørdist sjálvstøðugur myndugleiki. Nevndirnar, sum vóru knýttar at Kærustovninum, vórðu tiknar av yvir eitt tíðarskeið, og avgerðarheimildin varð flutt til Kærustovnin. Undantikin var Fjølmiðlanevndin, sum varð flutt av Kærustovninum. Fyrstu nevndirnar vórðu avtiknar 1. januar 2022, og seinasta nevndin varð tikin av 1. januar 2024 og avgerðarheimildin flutt til Kærustovnin.

Tá ið Kærustovnurin sjálvur tekur avgerð, ber betur til at leggja nýggj øki til stovnin. Fremsti førleiki Kærustovnsins er tó at viðgera fyrisitingarrættarlig kærumál og mál av fyrisitingarrættarligum slagi. Tey mál, sum verða løgd til Kærustovnin, eiga tí at hava týðandi fyrisitingarrættarligt innihald, tí hetta er kjarnuførleikin hjá Kærustovninum.

Mál, sum innibera bæði ráðgeving og kærumálsviðgerð á sama øki, eiga ikki at verða løgd til Kærustovnin. Um sami myndugleiki hevur avgerðarrætt og ráðgevandi leiklut, er vandi fyri, at myndugleikin gerst ógegnigur. Øki, sum innibera uppsøkjandi og útfarandi virksemi, eiga heldur ikki at leggjast til Kærustovnin. Tað fer altíð at vera neyðugt hjá Kærustovninum at raðfesta kæruviðgerð/málsviðgerð, ið er kjarnuuppgávan hjá stovninum. Tí er vandi fyri, at slíkt uppsøkjandi virksemi lættliga dettur niðurfyri.

Í álit um Føroya Kærustovn verður eisini mælt frá at leggja kærur um trætumál og privatrættarlig viðurskifti til Kærustovnin. Kærustovnurin er ikki ikki stinnur at taka sær av trætuloysnum meira alment og hevur heldur ikki nógvar royndir við kærum á privatrættarliga økinum. Um Kærustovnurin skuldi tikið seg av hesum økjum, hevði verðið neyðugt at sett nýggj fólk við øðrvísi førleikum, sum ikki høvdu starvast við kjarnuuppgávum stovnsins.

Tá ið ætlan er at leggja nýggj øki til Kærustovnin, er altíð neyðugt at taka støðu til játtanina hjá Kærustovninum. Eitt nú má metast um øktar útreiðslur til samsýningar til serkøn, og um tørvur er á størri starvsfólkaorku á Kærustovninum.

Tað hevur tí stóran týdning, at Kærustovnurin verður hoyrdur, tá ið ætlan er at leggja nýggj øki til stovnin, soleiðis at mett kann verða um, hvørt økið

- hóskar seg at leggja til Kærustovnin
- krevur størri starvsfólkaorku
- krevur øðrvísi førleikar, enn tey, sum longu eru á stovninum
- krevur, at nýggir serfrøðingar verða knýttir at stovninum
- hevur við sær, at neyðugt er við størri játtan til stovnin

Í mun til spurningin um, hvørji økir eru eftir at flyta til Kærustovnin, so er trupult at svara uppá hetta. Hvørki Løgmálaráðið ella Føroya Kærustovnur hevur yvirlit yvir hvørji økið, sum møguliga kundu verið løgd til Kærustovnin. Hetta eru aðalráðini, sum varða av økini, betur før fyri at svara uppá. Innan økið hjá Løgmálaráðnum er nevndin, sum tekur avgerð um endurgjald til brotsverksoffur, eitt økið, sum møguliga kundi verið flutt til Kærustovnin. Annars er tað serliga tá nýggj lóggáva verður sett í verk, og kærumøguleikar skulu umhugsast, at tað má takast støða til, um Kærustovnurin er rætti myndugleikin. Eitt dømi kundi verði, at um tað skulu verða kærumøguleikar í nýggja integratiónslógini, so kundi kærurnar leggjast til Kærustovnin.

Viðfest er yvirlit yvir øki og broytingar hjá Kærustovninum og yvirlit yvir nevndir, ið eru niðurlagdar í sambandi við umskipanina av Kærustovninum. Harumframt eru viðfest ymisk yvirlit yvir nevndir og ráð, sum Løgmansskrivstovan hevur gjørt.